Løgtingið

Svar
uppá

skrivligan fyrispurning nr. 48/2019 eftir tingskipanini § 52a til Bárð á Steig Nielsen, løgmann, frá Aksel V. Johannesen, løgtingsmanni, um vaktarvirksemi

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hevur løgmaður ætlanir um at fara undir at gera eina lóg um vaktarvirksemi í Føroyum?
2. Um so er, nær er ætlanin at fara undir hetta arbeiðið?
3. Hvørjar treytir hevur løgmaður ætlanir um at seta í eini møguligari vaktarlóg?

Svar

Til spurning 1:
Eg haldi avgjørt, at tað er skilagott at hyggja nærri eftir økinum.

Áðrenn endalig støða verður tikin til, hvussu vit eiga at skipa vaktarvirksemi í Føroyum, er neyðugt eftir mínum tykki at kanna nærri, hvør tørvurin er, og hvørji krøv eiga at verða sett.

Tað er upplagt at leggja fyri við at tosa við viðkomandi partar – bæði privatar og almennar, tí hesi kenna økið og vita ítøkiliga, hvør tørvurin er.

Ein møguleiki er at hyggja nærri at nýggju matstovulógini, ið varð sett í gildi í 2018, sum saman við kunngerðini um duravørðar, ið varð sett í gildi í januar 2020, m.a. setur førleikakrøv til duravørðar. Tá ið virksemið hjá duravørðum og vaktarvirksemi í ein ávísan mun minnir um hvørt annað, ber møguliga til at leita sær íblástur frá regluverkinum um duravørðar, tá ið vit skulu gera av, hvussu vit eiga at skipa vaktarvirksemi í Føroyum.

Verður niðurstøðan hon, at tað er skilabest at lóggeva á økinum, ber til at brúka donsku lóggávuna sum grundarlag fyri, hvussu tað skal lóggevast um vaktir og vaktarvirksemi.

Til spurning 2:
Løgmansskrivstovan fer undir arbeiðið í næstum.

Til spurning 3:
Sum eg geri greitt í svarinum til spurning 1, haldi eg, at tað er neyðugt at kanna nærri, hvør tørvurin er, og áðrenn endalig støða verður tikin til, hvørjar treytir vit eiga at seta til vaktarvirksemi í Føroyum.

Í Tinganesi, 11. februar 2020

løgmaður